# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 08.11.2017*

**Bygdaráðsfundur: 08.11.2017 kl. 18.00 til kl. 19.15**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd:** | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Marjun Gaardbo, skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 83/2017 Tilbúgvingarvirksemið**

J.nr. 14.00.00-Ø09-1-17

**Málslýsing**

Fíggjarætlanin fyri 2018, hjá Skálafjarðar Kommunala Sløkkiliði (SKS), er komin til ummælis hjá Nes kommunu. Gjaldið, pr. íbúgva undanfarna ár, var kr. 295, komandi ár verður gjaldið kr. 305. Íbúgvaratalið í Nes kommunu pr. 01.01.2017 er 1253. Parturin hjá Nes kommunu fyri 2018 verður sostatt 382 tkr.

**Tilmæli**

Á fundi 01.11.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Skálafjarðar Kommunala Sløkkiliði fyri 2018 soleiðis, sum fíggjarætlanin er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 84/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.32.10-S08-4-17

**Málslýsing**

Økistænastan Roðin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2018 áljóðandi 74.881 tkr., herav 65.007 tkr. skal gjaldast av samstarvinum. Parturin hjá Nes kommunu er 11.910 tkr.

**Tilmæli**

Á fundi 01.11.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini hjá Roðanum fyri 2018 soleiðis, sum fíggjarætlanin er uppsett.

**Avgerð**

Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 08.11.2017*

**Mál nr. 85/2017 Alment virksemið**

J.nr. 00.32.10-S08-5-17

**Málslýsing**

Námsfrøðiliga ráðið hevur á fundi viðgjørt fíggjarætlan skúlans til komandi fíggjarár, og hevur sent kommununi umsókn um játtan til fíggjarætlanina 2018.

Nes kommuna hevur gjørt eina langtíðarætlan fyri kt-øki, har kr. 100.000 vera játtaðar um árið.

Skúlastýrið hevur viðmælt fíggjarætlan skúlans fyri 2018, á fundi 04.10.2017.

**Tilmælir**

Á fundi 17.10.2017 mælir Mentanarnevndin til, at játtanin til skúlan/blokkin verður kr. 640.000 í 2018.

At játtanin til kt-útbúnað verður kr. 100.000 í 2018.

Á fundi 01.11.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 86/2017 Alment virksemið yvirhøvur**

J.nr. 00.32.10-S08-2-17

**Málslýsing**

Í skrivi 12.10.2017 søkir skúlastýrið um kr. 50.000 til tað vanliga skúlastýrisarbeiðið í 2018.

Somuleiðis biðja tey um kr. 5.000 til foreldraráðið, sum er eitt ráð fyri øll foreldraumboð í skúlanum.

**Tilmælir**

Á fundi 17.10.2017 mælir Mentanarnevndin til at játta skúlastýrinum kr. 55.000,00 í 2018.

Á fundi 01.11.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Mentanarnevndini.

**Avgerð**

Tilmælini frá Fíggjarnevndini og Mentanarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 87/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið**

J.nr. 20.07.00 -P00-1-15

**Málslýsing**

Nýggj løgtingslóg um musikkskúlaskipan var samtykt 29. mai 2017, og hevur ført við sær, at Nes sóknar Musikkskúli hevur gjørt tillagingar í reglugerðini fyri musikkskúlan.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 08.11.2017*

**Tilmæli**
Á fundi 17.10.2017 mælir Mentanarnevndini til at taka undir við broytingunum í reglugerðini fyri Musikkskúlan soleiðis, sum tær eru uppsettar.

**Avgerð**
Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 88/2017 Havnir og floghavnir**
J.nr. 08.05.25-P20-2-17
**Málslýsing**
Í skrivi 14.03.2017 søkir P/F Sandgrevstur um byggiloyvi til goymsluhøll á havnalagnum, niðanfyri verandi hallir hjá Landingarmiðstøðini og Plattavirkinum. Høllin er uml. 1330 $m^2$ til støddar.

**Tilmæli**
Á fundi 17.10.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi til høll við ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 89/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.02-P20-20-17
**Málslýsing**
Í skrivi 11.10.2017 søkir Borgar Hansen um byggiloyvi til eitt bilskýlið oman fyri sethúsini matr. nr. 699aa.

**Tilmæli**
Á fundi 17.10.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 90/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr.02.34.02-P20-21-17
**Málslýsing**
Í skrivi 11.10.2017 søkir Ingolf Petersen um byggiloyvi til bilhús við goymslurúmi, gongd og hjalli, sum verður bygt fast í sunnara enda av verandi sethúsum, matr. nr. 746i.

**Tilmæli**
Á fundi 17.10.2017 mælir Tekniska nevnd til at játta byggiloyvi eftir ávísum treytum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 08.11.2017*

**<u>Mál nr. 91/2017 Havnir og floghavnir</u>**
<u>J. nr. 08.03.26-P20-1-16</u>
**Málslýsing**
Í samband við verkætlanina " Eysturoyartunnilin" samtykti bygdarráðið í 2016 at taka upp samráðingar við P/F Eystur- og Sandoyartunlar um tunnilsgrótið. Á bygdarráðsfund 28/11-16 samtykti bygdarráðið at undirskrivað avtalu um móttøku av gróti frá tunnilsfelagnum.

Sambært avtaluni verður grótið, sum kemur úr Eysturoyartunlinum, eysturoyarmegin, og sum tunnilsfelagið sjálvt ikki hevur tørv á, býtt millum kommunur á Skálafjørðinum soleiðis, at Runavíkar kommuna fær 58%, Nes kommuna 22% og Sjóvar kommuna 20%. Samlaða nøgdin at býta er mett til 409.000 pfm3 (kbh-kubikk í føstum gróti). Sostatt verður nøgdin hjá Nes kommunu 89.980 pfm3. Við einum umrokningsfaktori uppá 1,8 er nøgdin 161.964 kbh í leysum.

Sjálvt tunnilsgrótið er ókeypis, men kommunurnar gjalda fyri flutningin.

Bygdarráðið og tekniska nevnd hava í longri tíð viðgjørt møguleikarnar við grótinum. M.a. er nógv tosað um at leingja verandi grótkast (pierin) við Tofta havn. Eisini er tosað um at nýta grótið, sum ífyllu til Ídnaðarøkið innanfyri við Rætt og aðrar verkætlanir.

Á bygdarráðsfundi 30. januar í ár samtykti bygdarráðið at gera botnkanningar fram við havnalagnum frá grótkastinum og norður um um ídnaðarøkið við Rætt, í samband við móttøku av grótinum. Botnkanningarnar, sum blivu gjørdar í summar, eru ein fyritreyt fyri umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni.

Í vár heitti tekniska nevnd á føroyskt ráðgevingarfelag um at koma við ítøkiligari frágreiðing og kostnðarmeting viðv. leingjan av verandi grótkasti (pieri) við Tofta havn. Framløga var fyri bygdaráðnum 29.08.2017.

Grótið frá Eysturoyartunlinum skal nýtast sum kjarnutilfar/fylla og harafturat krevst dekkgrót. Mett verður, at samlaða nøgdin av tunnilstilfari røkkur til, at grótkasið verður longt við 90-100 m.

Ætlanin við leingjan av verandi grótkasti (pieri), er at fáa eina tryggari atløgusíðu við Tofta havn. Við tryggari atløgusíðu kann hon nýtast meiri bæði fyri smærri bátar og størri skip og farast kann frá skipunum uttan ótta.

Metti kostnaðurin av leingjan av grókastinum (pierinum) við uml. 100 m er uml. 11,0 mió. kr, íroknað flutning og dekkgrót. Væntandi tekur arbeiðið millum 2 og 3 ár.

**Tilmælir**
Á fundi í teknisku nevnd 17.10.2017 mæla Niclas Davidsen og Elin á Torkilsheyggi til, at tunnilsgrótið verður brúkt til leingjan av verandi grótkasti.

Petur Jákup Petersen mælir til, at tunnilsgrótið verður brúkt aðrastaðni á havnalagnum t.d. ídnaðarøkið inni við Rætt, grótkast inni við Rætt, uppfylling vestanfyri bátahylin, og økið útið í Viku.

Á fundi 01.11.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá meirilutanum í teknisku nevnd, og at arbeiða víðari við verkætlanini saman við ráðgevingarfelag viðv. leingjan av verandi grótkasti.

*Broytingaruppskot frá Kaj Eli Hansen, har mælt verður til, at ætlanin um leingjan av grótkasti verður slept, men at grótið heldur verður brúkt aðrastaðnis.*

**Avgerð**
Atkvøtt varð fyri broytingaruppskotinum frá Kaj Eli Hansen. Petur Jákup Petersen og Kaj Eli Hansen atkvøddu fyri broytingaruppskotinum. Jóhannus Daniesen, Súni í Hjøllum, Elin á Torkisheygi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu ímóti broytingaruppskotinum, frá Kaj Eli Hansen.

Atkvøtt var fyri tilmælinum frá Petur Jákup Petersen. Petur Jákup Petersen og Kaj Eli Hansen atkvøddu fyri tilmælinum frá Petur Jákup Petersen. Jóhannus Daniesen, Súni í Hjøllum, Elin á Torkisheygi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu ímóti tilmælinum frá Petur Jákup Petersen.

Atkvøtt var fyri tilmælinum frá meirilutanum í Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini. Jóhannus Daniesen, Súni í Hjøllum, Elin á Torkisheygi, Niclas Davidsen og Høgni Hansen atkvøddu fyri tilmælinum frá meirilutanum í Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini. Petur Jákup Petersen og Kaj Eli Hansen atkvøddu ímóti tilmælinum frá meirilutanum í Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini.

**Mál nr. 93/2017 Bygningsregulering, grundstykkir og reglugerðir**
J.nr. 02.34.04-P20-1-17
**Málslýsing**
Í skrivi 04.09.2017 sendir Búnaðarstovan, vegna Sámal Olsen, umsókn um keyp av lendi burtur av matr. nr. 383a, til grundstykki, til støddar 827$m^2$.

**Tilmæli**
Á fundi 17.10.2017 mælir Tekniska nevnd til, at kommunan ognar sær lendið burtur av 383a, til støddar 827 $m^2$ , til at selja víðari til Sámal Olsen.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

Súni í Hjøllum var úti meðan málið varð viðgjørt.

**Mál nr. 94/2017 Fólkaupplýsing og frítíðarvirksemið**
J.nr. 18.15.00-S49-1-17
**Málslýsing**
Í skrivi 13.09.2017 søkir nevndin fyri Ungdómshúsið um fíggjarligan stuðul fyri 2018.

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 08.11.2017*

**Tilmælir**
Á fundi 19.10.2017 mælir Trivnaðarnevndin til at játta Ungdómshúsinum ein stuðul áljóðandi kr. 350.000 í 2018.

Á fundi 01.11.2017 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum frá Trivnaðarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Fíggjarnevndin og Trivnaðarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Mál nr. 95/2017 Alment virksemið yvirhøvur**
J.nr. 00.32.10-S08-3-17
Fíggjarætlanin 2018 – onnur viðgerð

Fyrsta viðgerð, av fíggjarætlanini fyri 2018, var á bygdaráðsfundi 25.09.2017.

Fíggjarnevndin mælir til, at høvuðstølini til aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2018, hjá Nes kommunu, eftir broytingar, vera hesi:

| **Rakstur tkr.** | **2018** | **2017** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristing | 4.483 | 4.296 | 187 | 4,4 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 15.980 | 15.370 | 610 | 4,0 |
| §3 Børn og ung | 10.890 | 10.479 | 411 | 3,9 |
| §4 Undirvísing | 3.646 | 3.582 | 64 | 1,8 |
| §5 Mentan og frítíð | 3.364 | 3.411 | -47 | -1,4 |
| §6 Teknisk mál | 4.292 | 3.936 | 356 | 9,0 |
| §7 Kommunalt øki | 2.841 | 2.682 | 159 | 5,9 |
| **Rakstur í alt** | **45.496** | **43.756** | **1.740** | **4,0** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur v.m.** | **52.338** | **46.904** | **5.434** | **11,6** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **6.842** | **3.148** | **3.694** | **117,3** |
| | | | | |
| **Íløgur tkr.** | | | | |
| §2 Almanna- og heilsumál | 100 | 210 | -110 | |
| §3 Børn og ung | 1.600 | 0 | 1.600 | |
| §4 Undirvísing | 1.300 | 600 | 700 | |
| §5 Mentan og frítíð | 1.000 | 148 | 852 | |
| §6 Teknisk mál | 6.097 | 1.590 | 4.507 | |
| §7 Kommunal virki | 5.630 | 600 | 5.030 | |
| **Íløgur í alt** | **15.727** | **3.148** | **12.579** | **399,6** |
| | | | | |
| **Úrslit aftaná íløgur** | **-8.885** | **0** | **-8.885** | **-100,0** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Afturgjald av skuld** | **2.910** | **2.660** | **250** | **9,4** |
| **Av tøkum peningi** | **4.795** | **2.660** | **2.135** | **80,26** |
| **Lántøka** | **7.000** | **0** | **7.000** | **100,0** |

Fíggjarnevndin mælir til, at skattaprosentið er óbroytt 20,50 % og, at barnafrádrátturin fer frá kr. 5.000 til kr. 5.500.

Fíggjarnevndin mælir til, at afturgjald av skuld tkr. 2.910 og partur av hallinum, tkr. 1.885, í alt tkr. 4.795 verða fíggjað við tøkum peningi, og at restin, tkr. 7.000, verður fíggjað við lántøku.

**Tilmæli**
Á fundi 01.11.2017 mælir Fíggjarnevndin til, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin fer frá kr. 5.000 til kr. 5.500.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Tilmæli**
Á fundi 01.11.2017 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2018 soleiðis, sum hon er uppsett. Afturgjald av skuld tkr. 2.910 og partur av hallinum, tkr. 1.885, íalt tkr. 4.795 verða fíggjað við tøkum peningi, og at restin, tkr. 7.000, verður fíggjað við lántøku.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Kunning**

| Rakstur | 3.kv. | fíggjarælTan v/eykajáttan | munur | % |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 2.973.889 | 4.296.000 | 1.322.111 | 30,8% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 11.337.770 | 15.370.000 | 4.032.230 | 26,2% |
| §3 Børn og ung | 7.713.105 | 10.683.000 | 2.969.895 | 27,8% |
| §4 Undirvísing | 2.481.535 | 3.582.000 | 1.100.465 | 30,7% |
| §5 Mentan og frítíð | 2.337.733 | 3.411.000 | 1.073.267 | 31,5% |
| §6 Teknisk mál | 4.099.754 | 4.783.000 | 683.246 | 14,3% |
| §7 Kommunal virki | 1.910.489 | 2.682.000 | 771.511 | 28,8% |
| **Rakstur í alt** | **32.854.275** | **44.807.000** | **11.952.725** | **26,7%** |
| §20 Inntøkur v.m. | -40.297.004 | -47.904.000 | -7.606.996 | 15,9% |
| **Rakstur pr. 30.09.2017** | **-7.442.729** | **-3.097.000** | **4.345.729** | **-140,3%** |

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 08.11.2017*

| Íløgur | 3.kv. | fíggjaræltan v/eykajáttan | munur | % |
|---|---|---|---|---|
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 210.000 | 210.000 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 134.246 | 0 | -134.246 | |
| §4 Undirvísing | 95.609 | 600.000 | 504.391 | 0,0% |
| §5 Mentan og frítíð | 270.989 | 766.000 | 495.011 | 64,6% |
| §6 Teknisk mál | -569.781 | 1.590.000 | 2.159.781 | 135,8% |
| §7 Kommunal virki | 187.186 | 1.093.511 | 906.325 | 0,0% |
| **Íløgur í alt** | **118.249** | **4.259.511** | **4.141.262** | **97,2%** |
| | | | | |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **-7.324.480** | **1.162.511** | **8.486.991** | **730,1%** |